LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 75

Fra: Høgni Hansen <hogni.hansen1982@gmail.com>
Sendt: 23. februar 2024 14:38
Til: VMR-Journal
Emne: Viðmerking til uppskot um burðardygga ferðavinnu

Góðan dag

Eg vil beinanvegin siga, at eg eri ímóti *Uppskotinum um burðardygga ferðavinnu*.

Sum ein av eigarunum í hagapartinum Heiman Kamb í Tjørnuvík har varðagøtan millum Tjørnuvík og Saksun gongur ígjøgnum vil eg siga, at vit eru millum tey, sum eru allar harðast merkt av ferðavinnuni í Føroyum í dag. Við hesum uppskotinum verður støðan í okkara haga uppaftur verri enn hon longu er frammanundan.

Longu sum støðan er í dag, so er ein stríður streymur av ferðafólkum sum ganga millum bygdargøtuna millum Tjørnuvík og Saksun. Tað verður gingið í øllum líkindum (sól, regn, mjørka, kava), allar tíðir á degnum (um morgunin, dagin, kvøldi og náttina) og nærum allar tíðir á árinum (frá fyrst í mars og líka út móti november). Úrslitið av hesum er, at gamla bygdargøtan - øll sum hon er - er eitt stórt og vaksandi runudíki. Lendi tjørnuvíksmegin er í høvuðsheitum mýrilendi, og so hvørt sum gøtan blívur runut, so verður gingið longur burtur frá gøtuni, við tí úrsliti, at ein vaksandi partur av økinum blívur til runulendi.

Vit hava onki hegn millum okkara haga og Kvíggjarhamars-hagan móti Saksun. Vit hava frá gamlari tíð havt sama áseyðatal sum vit hava í dag, og hava vit hildið fylgini uppi, soleiðis at okkara seyður altíð hevur verið sera støðufastur. Men hesi seinastu árini eru vit týðuliga byrjaðir at merkja fylgjuna av at alsamt fleri og fleri fólk ganga í okkara haga. Fylgjuni - tey sum liggja framvið varðagøtuni - eru ikki eins støðuføst sum tey hava verið og fer seyðurin oftari av haga nú enn hann plagdi. Hetta krevur fleiri arbeiðsdagar (biðja frí frá okkara borgarliga starvi) fyri at fáa seyðin til høldar og harvið fleiri útreiðslur.

Eisini fjalldagarnar merkja vit sviðan av ferðafólki sum er í haganum frá morgunstundini av (kl 7 á morgni!). Tað er komi fyri at vit hava mist seyð tí raksturin verður forstýraður av ferðafólkum, sum ganga og mala. Hetta viðførir fleiri arbeiðsdagar og harvið meir útreiðslur til okkum sum vara av haganum.

Somuleiðis er burturmáanin (erosion) á partar av lendinum á bygdargøtuni og øki framvið gøtuni blivin sera stór. Og máanin sær bara út til at vaksa fyri hvort ár sum gongur. Hetta viðførir eisini eitt minkandi bit til seyðin sum tískil eisini er ein útreiðsla (minni inntøka) fyri okkum sum vara av haganum. Fjøllini um bygdina tola ikki trýsti sum ferðavinnan leggur á tey. Summari í fjor (2023), var merkt av sera nógvum landnyrðingi, sum er mjørka ætt í Tjørnuvík. Tó hava tað sjálvdan gingið fleiri fólk enn tað sama eftir bygdargøtuni, hóast mjørkin lá oman móti bogarðunum nærum alt summari.

Innanbýggja merkja vit eisini sviðan av oktu ferðavinnuni. Ferðafólk í hópatal koma til bygdina og ein ikki so lítil partur av hesum fólkunum ganga í heilum og mala í bønum í tíðarskeiðnum frá síðst í mei til áleið hálvan juli, tá grasi skal hava frið at vaksa. Ávísir eigarar sum eiga stykkið fram vegnum merkja týðuliga at minni hoyggj fæst burturúr lendinum har hesi ferðafólk ganga og vása tá tey ikki eiga ella hava nakað at gera har. Hetta eisini ein beinleiðis útreiðsla fyri okkum, tí keypast má meir innflutt hoyggj/kraftfóður enn neyðugt.

Í dag er Tjørnuvík kanska eitt av teimum fáu plássunum í Føroyum har nærum allur bourin verður sligin og hoyggjaður upp á gamlan máta. Men eg vil sum eigari siga, at ferðavinnan í dag er við at fuldstendiga kova allan trivnað sum er í bygduni. Tað er nærum ikki hoyggjandi fyri øllum bilunum, tá man ikki sleppur í boin ella inn á egi privat øki (seyð-/hoyggjhús) fyri útlendingum í leigubilum. Og er man í bønum so stendur ein stórur hópur av ferðafólkum og tekur mynd av einum allan dagin ígjognum. Uppskotið sigst leggja upp til at verja okkara mentanararv (sum tað at hoyggja er), men eg dugi lítið av siggja av nakrari verju í uppskotinum. Ein kennist, sum um er man fremmandur í egnum landi! Hetta má og skal broytast um trivnaðurin í bygdini skal verða lív laga. Summari í 2021, tá Covid hevði ávirkan á ferðafólkatali, var einki minni enn fantastiskt fyri fólkini í bygdini. Vit merktu týðuliga, at tali av ferðafólkum var lækkað og bornini kundu spæla frítt aftur í bygdini - uttan at hava ampa av leigubilum.

Uppskotið leggur upp til at tað skulu vera kommunurnar sum skulu gera og hava ábyrgdina av bygdargøtunum. Vit vita væl, at tað er sera kostnaðarmikið at gera vanligar gøtur. Skulu gøtunar so eisini gerast upp um fjøll og viðlíkahaldast, so kemur hetta at kosta Sunda Kommunu fleiri 10-tal milliónir at gera og uppaftur meir at viðlíkahalda. Pengarnir sum kommunan fær við hesum uppskoti koma slett yvirhøvur ikki at strekkja til - hvorki at gera og eiheldur at viðlíkahalda goturnar. Tí vera tað borgarnir í Sunda Kommunu sum koma at rinda kostnaðin av hesum sirkusinum, meðan Tórshavnar Kommuna - har hotel, matstovur og bilútleigarar halda til - fara avstað við øllum inntokunum frá ferðavinnuni.

Persónliga hevði mítt tilmæli verið, at tey sum eiga og vara av jørðini sjálvandi skuldu fingið ein nógv størri part av inntøkuni frá ferðavinnuni, tá tað eru vit sum longu frammanundan hava nógv størst stríð og útreiðslur av ferðavinnuni. Tað eigur ikki og kann ikki vera rætt, at annan mans ferðavinna skal drívast gjøgnum privat øki, uttan at tann sum eigur jørðina fær nakra samsýning fyri hetta. Alt annað er tað reina galimatias!

Við kvøðu

Høgni Hansen